Landssjúkrahúsið

# Fylgiskjal 4

**Krøv til vøruveiting**
Fylgiseðil skal fylgja við øllum vøruveitingum. Fylgiseðil skal innihalda upplýsingar um vøru, vørunøgd og ordraupplýsingar. Hetta kann vera ordranummar ella navn á bíleggjara. Um fylgiseðil ikki er við vøruni, verður sendingin avvíst. Ógjørligt er at vørumóttaka uttan fylgiseðil.

Starvsfólk í Køkinum skulu taka ímóti vøruni sambært innaneftirlitskrøvum og fylgiseðlinum.

Fyri allar vørur er tað eitt krav, at pakkitilfarið er heilt og reint, og at øll vøra er dagmerkt.

Galdandi fyri allar vørur: Haldførið við móttøku skal í minsta lagi verða 50 % eftir í mun til framleiðsludagin.

**Epli, egg og kølivøra**
Hitin maks 5°C ± 2°C

**Frukt og grønmeti:**
Skal vera frískt og óspilt

Víst verður eisini til Rakstarreglurnar hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Vøran hjá Køkinum skal pakkast soleiðis, at tað ikki kemur bland í vørubólkarnar.
Vørubólkarnir eru: kolonial,eplir, frukt og grønmeti, frystivørur, kølivørur.

Orsakað av vørulyftuni í Køkinum, eru serlig krøv til vekt og hædd av vøruveitingini. Mest loyvda vekt er 600 kg brutto, og mest loyvda hædd er 1,20 m. Størsti platturin er 80x120mm svarandi til EUR platt.

Viðvíkjandi vørumóttøku annars verður víst til mannagongdina niðanfyri.

Viðvíkjandi veitingartíðum og – títtleika, verður víst til fylgiskjalið um veitingartíðir og - títtleika.

**Vørumóttøka, mannagongd**
Tá veitari kemur við vøru, skal bilførari ringja á klokkuna í móttøkuni. Køksstarvsfólk kemur at eftirkanna: Hita/kulda, pakking og fylgiseðil. Tá hetta er í lagi, vísir køksstarvfólkið bilførara á, hvar vøran skal setast.

Eru viðurskifitni við fylgiseðli, pakking og hita/kulda ikki í lagi, verður vøran avvíst.

**Køkurin/Tænastudepilin**
J.C. Svabosgøta 41-49, FO-100 Tórshavn, Tel. (+298) 304500 fax 314253 www.ls.fo, ls@ls.fo